

*»Takk fyri gott samstarv«, fer Tórbjørn Jacobsen í dag at siga teimum báðum gørnlendkus fólkatingsmonunum, Lars Emil Johansen og Kupiik Kleist – nú Høgni Hoydal tekur yvir fólkatingssessin*

# Høgni á Fólkating

Í dag – sjálvan grækarismessudag – býta Høgni Hoydal og Tórbjørn Jacobsen sess, og so er Høgni Hoydal fólkatingsmaður

Á Ríðibananum á Christiansborg skipar Norðuratlantsbólkurin fyri móttøku í sambandi við skiftið hjá Tjóðveldisflokkinum á fólkatingi.

Ríðibanin er partur av Christiansborg. Í kjallaranum eru hestarnir hjá Margrethu Drotning, og í erva hava fólkatingsmenn skrivstovur, teirra millum Tórbjørn Jacobsen og nú Høgni Hoydal.

Høgni Hoydal varð valdur á fólkating á valinum 21. november í 2001. Av tí at hann var landsstýrismaður, kundi hann ikki røkja fólkatingsstarvið eisini, og tí tók Tórbjørn Jacobsen við - hann var næstur á listanum.

Men fríggjadagin tekur so Høgni Hoydal við sessinum - og sleppur nú á fyrsta sinni at royna seg sum fólkatingsmann.

Tað er bert ein annar tjóðveldismaður, sum er valdur á Fólkating. Tað var Ellintur Patursson, sum varð valdur á fólkating í 1973 og 1975. Hann fall fyri Paula Ellefsen úr Sambandsflokkinum í 1977

# Grót: Konsert í Losjuni í Gøtu

Um vikuskiftið skipar »Grót« fyri konsert í Losjuni í Gøtu

Konsertin verður í kvøld, fríggjakvøld og byrjar kl. 21.

Tey sum fara at spæla eru: Visivindin úr Svøríki og Høgni Lisberg & Knút Eysturstein.

Visivindin er ein bólkur av lesandi á Nordiska Visskolan í Svøríki. Tey eru í løtuni á stuttari konsertferð í Norðurlondum og koma hendanevgin í hesum sambandi eisini. Tey framføra tað í best kann lýsast sum fólka-rokkur.

Høgni Lisberg og Knút Eysturstein fara at framføra egin løg. Høgni av fløguni sum kom út stutt fyri jól. Og Knút fer at framføra egin løg hann er í ferð við at geva út til eina komandi solo-fløgu.

# Sam heldur fram á Leirvíksfirði

Mikudagin kom Ternan av beding á Skála, eftir at árliga eftirlitið er liðugt. Ternan fer tó ikki aftur í sigling um Leirvíksfjørð.

Tann 2. februar varð Sam settur í sigling saman við fyrst Ternuni, og síðani Dúgvuni, meðan hesi vóru til árligt eftirlit.

– Skipanin síðani 2. februar hevur eydnast væl, ikki minst tí at Sam siglir sum farmaskip við framíhjárætti fyri lastbilum og trailarum. Tað var tí eitt ynski frá fleiri pørtum, at skipanin helt fram, til komið er á mál við einari varðandi loysn fyri siglingina um Leirvíksfjørð, sigur Strandferðslan í tíðindaskrivi.

Strandfaraskip Landsins rokna við, at tað fara at ganga 2-3 vikur, til fyrireikingarnar til nýggju ferðaætlanina eru lidnar. Í hesum tíðarskeiði vísa tey til galdandi ferðaætlan fyri Dúgvuna og Sam.

# Læknin fer at gera sendingar úr Føroyum

**Nú hevur Danmarks Radio gjørt av, at sjónvarpslæknin skal gera tvær sendingar úr Føroyum í summar. Læknin kemur til landið seinastu vikuna í mai og steðgar tvær vikur**

SJÓNVARP
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Peter Qvortrup Geisling fer at gera tvær sendingar úr Føroyum, sum skulu takast upp síðstu vikuna í mai og fyrstu í juni*

Sendingarnar, sum danski sjónvarpslæknin Peter Qvortrup Geisling fer at gera úr Føroyum, verða tvær í tali. Tær hava fyrst og fremst til endamáls at varpa ljós á føroyska sjúkrahúsverkið. Ætlanin er somuleiðis at gera innsløg frá øllum trimum sjúkrahúsunum í landinum, har fylgt verður við sjúklingum.

Danski læknin sigur seg vera sera ovfarnan av, hvussu væl føroyska sjúkrahúsverkið virkar, og vil hann fegin lýsa tað í hesum sendingunum.

Fyrireikararnir av vitjanini hjá læknanum her í Føroyum herfyri, IRIS úr Klaksvík, hava júst verið í Danmark, har teir hava fundast við leiðsluna á DR um, hvussu alt skal fyriskipast í sambandi við sendingarnar.

– Okkara leiklutur kemur at verða umboð fyri báðar partar. Ella rættari eitt millumlið millum DR og sjúkrahúsverkið. At útvega kontaktir og annað, sigur Niclas Heri Jákupsson, annar av teimum í IRIS.

Hann sigur frá læknanum, at hesin varð so positivt yvirraskaður av Føroyum, tá hann var her, og hann ætlar at seta ljós á tey góðu og vælvirkandi viðurskiftini her í landinum í sínum sendingum.

Danski sjónvarpslæknin Peter Qvortrup Geisling kemur hendanvegin aftur í mai og steðgar sum sagt í tvær vikur.

# Rógva og røða á grækarismessu

**Á Tvøroyri fara tey at gera eitt sindur meiri burturúr Grækarismessu, enn tey plagdu**

GRÆKARISMESSA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í dag er 12. mars og sostatt er grækarismessa. Í dag er nevniliga dagurin, tá ið tjaldrið, tjóðfuglur okkara, formliga kemur til landið og tann dagurin verður hátíðarhildin kring alt landið.

Eisini á Tvøroyri fara tey at hátíðarhalda grækarismessu og har fara tey at gera eitt sindur meiri burturúr, enn tey plagdu.

Í ár eru tað kappróðrarfelagið á Tvøroyri og felagið Naddoddur, sum skipa fyri haldinum. Og tað byrjar alt samalt klokkan 17.30 í dag við kappróðrarneystið. Har verða tveir kappróðrarbátar hjá felagnum flotaðir. Har er ætlanin at Naddoddur skal liggja og bíða eftir teimum og somuleiðis koma eisini tveir kappróðrarbátar úr Vági norður at at vera við í tiltakinum.

Gamlir rógvarar hjá kappróðrarfelagnum á Tvøroyri og gentumanningin á Firvaldi, fara síðani at rógva, saman við Nadoddi og teimum báðum vágsbátunum, vestur í neystið hjá Naddoddi.

Har verður sangur og Jónsvein Bech, prestur, fer at halda røðu og har fer eisini Tvøroyrar Kommuna at bjóða fólki kakao og bollar.

Men alt hetta er treytað av, at veðrið verður gott í morgin. Viðrar ikki, er ætlanin at hava grækarismessuhaldið leygardagin ístaðin.

# Føroysk bók í danskari týðing

**Søgusavnið »Pílagrímar« eftir Hanus Kamban komið út í danskari umseting**

BÓKAÚTGÁVA

Í 2001 læt føroyski rithøvundurin Hanus Kamban úr hondum sítt fjórða stuttsøgusavn. Í bókini, sum hevði heitið PÍLAGRÍMAR, vóru níggju stuttsøgur. Mentunargrunnur Studentafelagsins gav bókina út.

Henda bókin er nú útkomin í dansakri týðing. Útgevari er Fiskers Forlag. Á bakpermuni upplýsir forlagið, at høvundurin við hesum savni tekur til bókmentaliga umrøðu tjúgundu aldar skurslaðu pílagrímar, á veg móti ástartokkans, skaldskaparins ella utopiska samfelagsins Mekka. Søgurnar ferðast í rúmi millum Sovjetsamveldið í 30-árunum, Montagnola í Sveits, danskt og europeiskt stórbýarumhvørvi, tað afturlatna føroyska bygdasamfelagið. Miðdepil í savninum er søgan »Tann hvíti maðurin« – um ein fanga, sum – rýmdur undan hemingum í síni fortíð – er á ferð móti dómkirkjuni í Canterbury.

Bókin var í uppskoti til at fáa Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins fyri 2003.

Kirsten Brix, lektari, hevur týtt PÍLAGRÍMAR til danskt. Bókin, sum kostar 142 krónur, er at fáa í føroyskum bókhandlum.





# Semingsfundur leygardagin

**Semingsmenninir eru komnir upp í samráðingarnar millum Starvsmannafelagið og Føroya Arbeiðsgevarafelag um sáttmálan fyri limir Starvsmannafelagsins á Føroya Tele**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*

Steðgur er í samráðingunum millum Starvsmannafelagið og føroya arbeiðsgevarafelag um sáttmálan fyri limir Starvsmannafelagsins á Føroya Tele. Semingsmenninir eru boðsendir.

Semingsmenninir, Jógvan Amonson og Alfred Petersen, hava boðsent pørtunum at koma á fund á middegi leygardagin, sigur Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Sarvsmannafelagnum. Sáttmálin er longdur til á midnátt sunnukvøldið.

Ósemja er um sjálva lønarammuna, og ta ósemjuna skulu semingsmenninir so royna at loysa áðrenn á midnátt sunnukvøldið.



*Gunnleivur Dalsgarð, formaður Starvsmannafelagsins*



# Vinnumálaráðið provokerar

**Tvøroyar Kommuna fer ikki at góðtaka uppskotið um at strika endurgjaldið til kommunurnar, tá farleiðir hjá Strandferðsluni verða fluttar ella niðurlagdar. Kommunan stendur til at missa stívliga átta milliónir**

ENDURGJALD
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*

Ein nýggjur trumfur er komin á borðið í stríðnum millum Tvøroyar Kommunu og Vinnumálaráðið um havnina og ikki minst havnargjaldið á Drelnesi.

Trumfin eigur Vinnumálaráðið, sum við uppskotinum um at strika endurgjaldið til tær kommunur, har sjóvegis farleiðir hjá Strandferðsluni verða fluttar ella niðurlagdar, ætlar at spara 16,2 milliónir krónur.

Sum er koyrir eitt rættarmál millum Strandferðsluna og Tvøroyar Kommunu, eftir at kommunan á sumri 2002 av sínum eintingum valdi at hækka havnargjaldið fyri Smyril úr 58.000 krónum upp í 152.000 krónum um mánaðin. Tað hevði kommunan formliga loyvi til, eftir at landsstýrið í 2000 gav kommununum heimild til sjálvar at áseta havn-argjaldið.

Men ein tílík hækking var meira enn Strandferðslan, og harvið Vinnumálaráðið, kundi góðtaka, og tí skil endaði málið í rættinum.



*Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri*

Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri, verjir í dag stóru hækkingina á havnargjaldinum. Hann vísir á, at økið á Drelnesi kravdi stórar ábøtur, og tá landið ikki fekst at bera part av kostnaðinum, valdi kommunan at hækka gjaldið.

Í mai mánað í fjør bað Vinnumálaráðið Løgmálaráðið um eina meting av, hvørt Tvøroyrar Kommuna hevði rætt til at hækka gjaldið. Men í svari, dagfest 13. oktober, staðfestir Løgmálaráðið, at ivasamt er um til ber at vísa á, at kommunan hevur framt nakað brot, og at einki grundarlag er at seta rættarlig tiltøk í verk móti kommununi sambært kommunustýrislógini.

### Strikar endurgjald

Málið um hækkingina av havnargjaldinum er ikki avgreitt, men nýggja uppskotið um at strika endurgjaldið til kommunurnar broytir støðuna rættuliga nógv.

Fær Tvøroyrar Kommuna viðhald í sakarmálinum móti Strandferðsluni, hevur kommunan rætt til 7,9 milliónir krónur í endurgjaldi fyri mista inntøku, tá nýggja samferðsluhavnin verður tikin í nýtslu.

Men verður uppskotið samtykt, kann Tvøroyrar Kommuna í síðsta standa eftir við svartaper, og einki endurgjald fáa.

– Vit kunnu ikki góðtaka, at endurgjaldið verður strikað, staðfestir Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri.

Hann vísir á, at hóast landið á sinni rindaði millum 50 og 60 prosent av kostnaðinum av havnini á Drelnesi, so hevur Tvøroyrar Kommuna eisini havt stórar útreiðslur í hesum sambandi.

Og sjónarmiðið um at Tvøroyri fær eina nýggja og betri havn í staðin rínur ikki við borgarstjóran.

– Samferðsluhavnin er skræddaraseymað til Smyril, og hevur einki við hetta málið at gera, slær Kristin Michelsen fast.

– Tvøroyri hevur havt stórar útreiðslur av havnini á Drelnesi, og øll árini meðan skipini hjá Strandferðslan hevur siglt har, hevur havnin í stóran mun ikki kunnað verið nýtt til onnur endamál, tí strandfaraskipini hava ligið har, sigur borgarstjórin á Tvøroyri.

# Tobbi spyr løgmann um Breckmann

**Torbjørn Jacobsen vil hava Jóannes Eidesgaard løgmann siga sína hugsan um útsagnirnar hjá Óla Breckmann um flóttafólk, ið hesin førdi fram í eini valsending í Útvarpinum. Eisini spyr tjóðveldistingmaðurin løgmann um habilitetin hjá Breckmann at sita í Norðurlandahúsinum**

FYRISPURNINGUR
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*

Tingmaðurin hjá Tjóðveldisflokkinum sipar til valsendingina »Í andgletti«, sum varð send í Útvarpinum 12. januar.

Í skrivligum fyrispurningi til Jóannes Eidesgaard, løgmann, vísir Torbjørn Jacobsen á fleiri úttalilsi hjá Óla Breckmann í hesi sending. Hann vísir á, at tá Óli Breckmann í sendingini varð spurdur um Fólkafloksins støðu til, hvørt Føroyar skulu taka ímótoi flóttarfólki, svaraði hesin, at tað kundi koma uppá tal í »ávísum ógvuliga avmarkaðum førum«.

Eisini vísir Torbjørn Jacobsen á orðini hjá Óla Breckmann, har hann sigur seg halda, »at vit skulu halda flóttarfólk, serliga av tí muslimska slagnum, úti. Tí tey fólkini hava serliga ringt við at innrætta seg eftir umstøðunum í teim um londum, sum tey fossa inn í.«

Og tingmaður Tjóðveldisfloksins vísir á fleiri úttalilsi í somu sending. Millum annað: »Vit fara ikki at blaka Føroyar víðopnar fyri øllum tí drasli, sum rekist runt. Tað eru 20-30 milliónir flóttarfólk í verðini, og Føroyar eru for smáar til at taka so mikið sum ein lítlan brotpart inn«.

Torbjørn Jacobsen vísir á, at hóast hesi úttalilsi hevur landsstýrið við Jóannes Eidesgaard á odda valt júst Óla Breckmann at umboða Føroyar í Norðurlandaráðnum. Og hann undrast á, at løgmaður og flokkur hansara, sum áður hava tikið frástøðu frá sjónarmiðunum hjá Óla Breckmann, nú velja hann at umboða føroysku tjóðina í Norðurlandaráðnum, har spurningurin um støðu Norðurlanda til heimsins neyðstøddu fólk sjálvsagt eisini verður og fer at verða viðgjørdur.

Tí vil Torbjørn Jacobsen hava Jóannes Eidesgaard at svara, hvørt hann tekur undir við nevndu sjónarmiðum hjá Óla Breckmann, hvat løgmaður heldur um hesi sjónarmið, og um løgmaður heldur at tað tænir umdømi Føroya, at ein maður við tílíkum sjónarmiðum umboðar Føroyar í Norðurlandaráðnum.

# Grækarismessa á Sandi

Heima á Sandi í Sandoynni verður grækarismessuhald í dag, har Jákup Reinert Hansen, prestur, heldur røðu. Haldið klokkan 17.15 við Bankan.

# Grækarismessuhald í Runavík

Grækarismessuhald verður á torginum uttan fyri Býráðshúsið í Runavík í dag, grækarismessudag, klokkan 18.

Tóta Árnadóttir fer at flyta fram røðu, Nes Sóknar Hornorkestur spælir og skótarnir ganga skrúgongu.

Til ber at keypa sær eina heita vaflu, kaffi og te frá skótunum.

Skrúgongan fer frá Posthúsinum kl. 17.45, verður sagt úr Runavík.

# Loppumarknaður í Hoydølum

Í morgin kl 13, leygardagin, skipar studentaskúlaflokkurin 02z fyri stórum tiltaki. Á skránni verður m.a. stórur loppumarknaður, bilvask, pony-ríðing, café og onnur tiltøk til børnini.

02z í Hoydølum skipar fyri tiltakinum í samband við, at tey skulu á námsferð til Lissabon í apríl mánaði.


J. Broncks gøta 37 · Postsmoga 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo
WWW.SMYRIL-LINE.COM



## Frítíðaravloysarar

**Søkt verður eftir frítíðaravloysarum til ferðamannadeildina at byrja skjótast gjørligt.**

**Starvið fevnir um:**

- Avgreiðslu av ferðafólki bæði á skrivstovuni, yvir telefon, telefaks og t-post
- Bílegging av hotellum, summarhúsum, íbúðum, v.m.
- Skipaavgreiðsla/Check-in
- Vanligt skrivstovuarbeiði

**Førleikakrøv:**
Til starvið krevst, at umsøkjarin hevur nakað av teldukunnleika og kann málbera seg á enskum og/ella týskum - bæði í skrift og talu.

Dentur verður lagdur á, at viðkomandi er røkin og hevur góð samstarvsevni.

**Setanarviðurskifti:**
Starvstíðin er frá nú av og til umleið 15. august/ 1. september

**Umsóknir:**
Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu sendast til:

***Smyril Line***
***c/o Áki Jespersen***
***Postsmoga 370***
***FO-110 Tórshavn***

ella við telduposti til:

***booking@smyril-line.fo***

Umsóknin skal vera okkum í hendi skjótast gjørligt.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Áka Jespersen á tlf. 34 59 00.







Smyril Line varð stovnað í 1982, við tí endamáli at knýta saman londini í Norðuratlantshavi, Føroyar, Ísland, Noreg, Hetland og Danmark.

Hvørt summar síðan 1983 hava fyrst gamla Norröna, ið hevði pláss fyri 1.050 ferðafólkum og 300 bilum, og síðani nýggja Norröna, sum hevur pláss fyri 1.482 fólkum og 800 persónbilum, siglt millum hesi lond.

Høvuðsskrivstova felagsins er í Tórshavn. Eisini hevur Smyril Line skrivstovur í Danmark/Hanstholm, Noregi/Bergen, Íslandi/Reykjavík og í Shetlandi/Lerwick. Agentar í Svøríki, Finnlandi, Týsklandi, Eysturríki, Sveits, Benelux, Frankaríki og Italia.

Á ferðamannadeildini er møguligt at avgreiða allar ferðir, bæði við skipi og flogfari. Flogdeildin hevur við sínum IATA loyvi møguleika at avgreiða flogferðir kring allan heim.

SMYRIL LINE



SMYRIL LINE